Ongar sparingar á nýggja Smyrli

Tað eru ongar sparingar gjørdar á nýggja Smyrli sum gera umstøðurnar hjá ferðafólki verri og sum gera, at hann siglur seinni

NÝGGI SMYRIL
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Tað eru ongar sparingar gjørdar á nýggja Smyrli.

Tað staðfestir Strandferðslan.

Annars hava seiglívað tíðindi gingið í Suðuroy um, at sparingar eru settar í verk umborð á nýggja Smyril, fyri at fáa hann biligari.

Eitt nú skuldu sylindrarar verða spardir burtur á motorinum, so at hann kemur ikki at sigla tey 21 mílini, sum ásett varð.

Men hetta avsannar Magnus Magnussen á Strandferðsluni, sum hevur eftirlitið við byggingini.

– Motorararnir eru langt síðani settir í og teir eru akkurát, sum ætlanin var. Motorarnir eru heldur ikki nakað, sum verður broytt soleiðis í óðum verkum.

Tað hava eisini gingið søgur um, at sitiplássini umborð eru ov vánalig.

Smyril siglur mangan tíðliga um morgunin og tað er ongin loyna, at nógv ferðafólk seta stórran prís uppá, at nógvir benkur eru umborð á Smyrli, so at tey fáa lagt høvdið niðurat eina løtu.

Men nú verður sagt, at umborð á nýggja Smyrli eru bara stólar og ongir benkur.

Men tað avsannar Magnus Magnussen eisini.

Hann sigur, at tað eru uppaftur fleiri benkur umborð á nýggja Smyrli, enn tað eru umborð á Smyrli, sum nú siglur.

– Tað eru nógv fleiri sitiplárs sum heild umborð á nýggja Smyrli. Tað eru fleiri stólar, men tað eru eisini nógv fleiri benkur, so møguleikarnir fyri at leggja seg fara at verða nógv betri á nýggja Smyrli, enn teir eru á hesum.

Men hann leggur aftur at, at upprunaligavar ætlanin at tað skuldi ikki vera so nógvir benkur umborð.

Men eftir ynski frá suðuroyingum er tað broytt.

– Hetta er eitt dømi um ta ávirkan, sum brúkarin hevur havt á byggingina, sigur Magnus Magnussen.

Onki skil á arbeiðslagnum

Annars er støðan viðvíkjandi nýggja Smyrli rættiliga flótandi í løtuni.

Arbeiðsfólkið á Skipasmiðjuni er meiri og minni í verkfalli alla tíðina, tí teir vilja hava greiði á framtíðini.

Skipasmiðjan í San Fernando í Spania, ar Smyril verður bygdur, er ein av skipasmiðjunum í IZAR samtakinum, sum í summar fekk álagt at betala ovurhonds stóra upphædd aftur, sum tað skuldi havt fingið í ólógligum stuðuli úr spanska landskassanum.

Í tí sambandi hevur verið tosað um at lata onkrar skipasmiðjur aftur og at einskilja aðrar og tað skapar órógv hjá arbeiðsfólkunum.

Hesndan seinasta tíðin hevur sostatt verið merkt av verkfalli.

Annars skuldu arbeiðsfólkið arbeiða fríggjadagin og í gjár, men so skuldi aftur tiltøk verða í dag og í morgin, har arbeiðið varð niðurlagt.

Men í gáramorgunin møtti ongin til arbeiðis, fyrrenn klokkan 11 og teir fóru til húsar aftur longu klokkan 14. Í dag skuldi vera sama skilið.

Sostatt er tað enn ongin, ið kann siga nakað um, nær nýggi Smyril verður liðugur.

Men Strandsferðslan hevur ikki sáttmála við hesa einstøku skipasmiðjuna. Sáttmálin er við IZAR samtakið, ið eigur nógvar skipasmiðjur. Men enn er spurningurin um at sleipa Smyril onkra aðrastaðni, ikki viðgjørdur.

–Tiverri boygnaði landsstýrið fyri trýstinum frá høgrakreftunum í samgonguni og í vinnuni.Úrslitið er sparingar, sum onki skil er í, er eirindaleysi dómurin, sum formaðurin í Starvsmannafelagnum fellur yvir sparingarnar í almennu fyrisitingini

Nú skal Anfinn Kallsberg sláa grasplenuna lidnað

– Nú hevur landsstýrið sligið plenuna javnt snøgga og nú fer tað at geva figgjarnevndini plenuklippparan til at sláa grasplenuna lidnað, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum

SPARINGAR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Borgarligu kreftirnar í samgonguni og í privatu vinnuni hava vunnið!

Hetta er greiðið dómurin, sum formaðurin í Starvsmannafelagnum, fellur yvir sparingarnar hjá landsstýrinum í almennu umsitingini.

Starvsmannafelagið er nógv tað største fakfelagið á almenna arbeiðsmarknaðinum. Og formaður felagsins, Gunnleivur Dalsgarð, hevur onga sum helst virðing fyri teimum sparingum, sum landsstýrið nú hevur boðað frá í miðfyrisitingini.

Hann ivast ikki í, at hetta er eitt tiltak, sum tær borgarligu kreftirnar í samgonguni og í føroyska vinnulívinum, hava kroyst landsstýrið til.

– Og tíverri er lands-stýrið boygnað. Men sparingarnar eru sostatt eina og aleina settar í verk fyri at tekkjast borgarligu kreftunum í samgonguni og í vinnulívinum.

Sparingar uttan mið ella mál

Formaðurin í Starvsmannafelagnum finst hvassliga at mátanum,sum landsstýrið hevur sett sparingarnar í verk upp á.

– Landsstýrið hevur ikki gjørt eina nágreinliga kanning av miðfyrisitingini fyri at kanna eftir, hvørji arbeiðsøki møguliga kunnu sparast burtur, og hvussu fyrisitingin kann skipast eftir sparingarnar.

– Tað verður rætt og slatt als ikki hugt eftir, hvar í fyrisitingini tað eru ov nógv fólk.

– Ístaðin fer landsstýrið púra hugsjónarleyst runt við plenuklipparanum og klippur plenuna javnt snøgga, uttan nakað sum helst mið ella mál.

Og Gunnleivur Dalsgarð heldur eisini, at boðskapurin hjá landsstýrinum er púra greiður.

– Boðskapurin er, at nú hevur landsstýrið gjørt sítt fyri at spara í almennu fyrisitingini og nú væntar landsstýrið at eisini figgjarnevndin og Løgtingið eisini sítt.

– Sostatt hevur landsstýrið nú handað figgjarnevndini plenuklipparan til at gera fleiri sparingar við.

Tí Stúrir Gunnleivur Dalsgarð stórliga fyri, at tað verða enn fleiri sparingar hjá tí almenna. – Men nú verður tað bara Annfinn Kallsberg og figgjarnevndin, sum skulu føra plenuklipparan og sláa graspleuna lidnað - tvs, seta fleiri sparingar í verk.

Borgarligur kreftirnar fríari ræsur

Gunnleivur Dalsgarð ivast ikki í, at sparingarnar fara at lækka støðið í almennu fyrisitingini. Og tær fara somuleiðis at gera umstøðurnar hjá starvsfólkunum verri.

Hann sigur, at tey, sum arbeiða í almennu fyrisitingini, hava nóg mikið at gera frammanundan og tað sigur seg sjálvt, at tey fara ikki eisini at átaka sær arbeiðsuppgávurnar, sum tey, ið eru koyrd til hús, høvdu.

– Tað hevur altíð verið eitt endamál hjá borgarligu kreftunum at gera fyrisitingina veikari og tað er nú eydnast.

– Sostatt er nú slóðað fyri, at borgarligu kreftirnar í samfelagnum fáa fríari teymar til at gera, sum tær vilja.

– Tað er sjálvsagt ein ynskistøða hjá privatu vinnuni, at almenna fyrisitingin er veik, so at vinnan er verður sterkari enn fyrisitingin.

Tað setir vinnuna í eina sterkari støðu mótvegis almennu fyrisitingini.

– Eitt dømi er fiskivinnan, har ein íslendskur fiskifrøðingur varð boðsendur, sum hevur tann rætta boðskapin, heldur enn at dúva upp á eina sterka, føroyska fiskirannsóknarstovu.

– Eitt annað dømi er Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum ikki fær arbeiðsumstøður til at røkja sínar eftirlitsuppgávur mótvegis vinnuni.

– Sostatt fær privata vinnan fríari ræsur at bera seg at, sum hon vil. Samstundis ger tað fyrisitingina veikari mótvegis ávirkan frá politikarum.

Men Gunnleivur Dalsgarð ávarar staðiliga ímóti at gera fyrisitingina veikari.

– Eitt samfelag, sum ikki hevur eina sterka og vælvirkandi fyrisiting, er politiskt sjúkt. Tað er bara at líta aftur í áttatiárini, tá ið fyrisitingin var alt ov veik til at til at standa politikarum og vinnulívi kurl.

– Úrslitið sóu vit eisini, leggur hann afturat.

Dagstovnar í stórum broytingum

– Av tí, at ansingartørvurin ikki longur verður ein trupulleiki, fara dagstovnarnir framyvir at hava ein øðrvísi leiklut, enn teir higartil hava havt. Tað halda teir fýra fyrireikararnir av stórari ráðstevnu, sum varð hildin um vikuskiftið

RÁÐSTEVNA
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

– Tíðin, sum børnini hava saman við starvsfólkinum í dagstovnunum, hevur ógvuliga stóra ávirkan á, hvussu børnini fara at verða sum eldri.

– Dagstovnarnir hava sera nógv at siga fyri uppalingina og persónsmenningina hjá børnunum, og tí er tað ikki líkamikið hvørji starvsfólk eru í dagstovnunum.

– Samfelagið er í støðugari menning, og tað er alneyðugt, at dagstovnarnir fylgja við í menningini, og ikki halda fast í gamlar vanar, bert tí teir eru gamlir vanar.

Millum annað hetta kom fram á stórari ráðstevnu um trivnað hjá børnum, sum var hildin í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið. Luttakarar vóru pedagogar og starvsfólk á dagstovnum um alt landið, og millum fyrilestrahaldararnar vóru kendu Erik Siegsgaard og Margrethe Brun Hansen.

Tað vóru tær fýra, Maibritt Simonsen, Turið Horn, Poula Eidesgaard og Jórun Niclasen, ið skipaðu fyri.

Stovnarnir nýggjan leiklut

Spurdar, um leikluturin hjá dagstovnunum er um at broytast, svara tær sum við ein munn, at tað er hann avgjørt.

Tær siga seg allar rokna við, at nú ansingartørvurin er um at verða fyltur, fer leikluturin hjá stovnunum eisini at broytast.

– Fyrr tóku foreldrini gleðiliga við einum og hvørjum stovnsplássi, tey fingu. Tey kundu ikki tilláta sær at seta nøkur krøv, tí tey vóru glað, bara tey fingu ansingarpláss. Men nú er tørvurin nøktaður, og foreldrini fara nú at kunna velja hvønn stovn tey ynskja. Tey fara at seta krøv og seta spurnaðartekin við ymisk ting, sum vit starvsfólk kanska ikki hava givið okkum far um fyrr, greiða tær fýra frá.

Poula Eidesgaard, Turið Horn, Maibritt Simonsen og Jórun Niclasen, fyrireikarar av ráðstevnuni, sum var í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið
Mynd: Eydna Skaale

Tær eru samdar um, at tað er ein gott at hava foreldur, ið seta krøv, tí tað ger, at starvsfólkið á stovnunum ikki kann »sovna« í arbeiðnum. Og tað hjálpir teimum at síggja, hvar orkan skal setast.

Fyrr vóru ansingarstovnarnir ein praktisk loysn fyri foreldrini, soleiðis, at tey sluppu aftur til arbeiðis, hvat tú skalt gera, jamen so kanst tú altíð fara í ein barnagarð, tí tað arbeiðið klára øll, sigur Turið.

Tær rista allar við høvdinum og staðfesta, at hatta er ein rættiliga vandamikil hugsan. Tíðin í barnagarðinum er sera týdningarmikil fyri framtíðina hjá børnunum, og tær sláa fast, at tað tí ikki er líkamikið hvør er um børnini. Tað er eitt arbeiði, sum krevur kompetancu.

– Av tí, at starvsfólkið í dagstovnunum hevur eina so stóra ávirkan á hugsanar hjá børnunum, er tað ikki líkamikið hvør tað er, sum arbeiðir har. Men okkara størsti trupulleiki er, at vit í Føroyum bert taka ein pedagogflokk inn um árið, og tað er langt frá nóg mikið til at nøkta tørvin, greiðir Maibritt frá.

Tað verður mælt til, at tveir triðingar av starvsfólkinum á stovnunum skulu vera pedagogar og ein triðingur skal vera starvsfólk. Men sum tað er í dag, er býtið akkurát øvugt.

– Tað er ógvuliga óheppið, men tað vísir seg bara ikki at vera politiskur vilji til at økja um talið á pedagogflokkum. Politikarnir tykjast enn halda, at dagstovnarnir bert eru til, fyri at foreldrini skulu kunna arbeiða, sigur Jórun.

Ovurstórur tørvur

Tær fýra siga, at dagstovnastarvsfólkið stendur við eini ógvuliga stórari ábyrgd, og við dagligum trupulleikum, sum kunnu vera sera torførir at loysa. Tí hildu tær tørv vera á eini ráðstevnu sum hesari.

– Stóri áhugin fyri hesari ráðstevnuni vísir heilt greitt, at okkum veruliga tørvar at seta fokus á nøkur ting í okkara arbeiði. Starvsfólkini á dagstovnunum hungra eftir, at arbeiðið verður tosað ígjøgnum, tað sást tú týðiliga um tú eygleiddi áhoyrararnar undir fyrilestrunum, sigur Turið.

Tær fýra siga, at tær vistu um tørvin, men tær høvdu als ikki væntað, at hann var so ovurhondsstórur.

Tað hevur tikið teimum hálvtannað ár at fyrireika ráðstevnuna. Orsøkin til longu fyrireikigartíðina er, at tær vildu hava barnaserfrøðingarnar og ríthøvundarnar Margrethe Brun Hansen og Erik Siegsgaard við, og tey eru umbiðin langt fram í tíðina.

– Tey hava bæði tvey skrivað nakrar ógvuliga viðkomandi bøkur, sum vit kenna her í Føroyum. Tey hava somu hugsan um børn og uppaling, og tey hava royndir í at vera við á rástevnum, tí vildu vit hava tey bæði við, greiða teir fýra fyrireikararnir frá.

– Vit vistu, at áhugin var til staðar, men vit høvdu kanska roknað við eini 200 fólkum. So tað var luttakaratalið, sum vit settu roknistykki upp eftir. Komu tað 200 fólk, høvdu vit framvegis skinnið á nøsini, greiðir Poula frá.

Men áhugin vísti seg at vera umleið tríggjar ferðir so stórur. Ráðstevnan var fullteknað við fýrahundrað luttakarum, og tað vóru somuleiðis yvir 200 fólk, sum ikki sluppu við vegna plásstrot.

Tær siga seg hava fingið nógvar positivar afturmeldingar.

– Ráðstevnan hevur nomið við nøkur sera viðkomandi gerandisting, sum vit ganga og stríðast við í tí dagliga. Allir fyrilestrarnir viðgjørdu aktuell ting, sum vit kendu okkum aftur í. Tað prógvaði láturin, sum rungaði í salinum, tá fyrilestrahaldararnir komu við ymiskum dømum úr gerandisdegnum, siga tær.

Maibritt, Turið, Poula og Jórun hava fingið eitt sera stórt herðaklapp fyri ráðstevnuna, og tað hevur givið teimum hug at skipa fyri einum líknandi tiltakið aftur.

– Hvør veit, kanska vit finna uppá okkurt einaferð í framtíðini. Vit hava í øllum førum hug til tað, og nú hava vit eisini fingið nakrar royndir av at skipa fyri hesari ráðstevnuni. Og at áhugin og tørvurin er til staðar, er í øllum førum staðfest, siga tær at enda.

Súsan Hvidbro, pedagog, Frítíðarskúlin
Mynd: Eydna Skaale

Hvat hevur tú fingið burturúr ráðstevnuni?

– Eg havi heilt avgjørt fingið nógv burturúr. Man kennir til tilfarið, tí man hevur lisið bókurnar, og tí er tað ógvuliga stuttligt at síggja og hoyra fólkini, sum hava skrivað tær. Og tað er avgjørt gott at verða mintur á, hvat tað er, sum vit hava lisið.

Er tað tørvur á ráðstevnum sum hesari?

– Ja, tað er tað so heilt avgjørt! Okkurt líknandi kann gott vera aftur skjótt.

Jensia av Steinum, pedagog, Dagstovnurin á Løgmannabreyt
Mynd: Eydna Skaale

Hvat hevur tú fingið burturúr ráðstevnuni?

– Eg havi heilt sikkurt fingið nógv gott burturúr. Tað er nógv bliv sagt, sum tú ikki hugsar um í gerandisdegnum. Men sum tú hevut gott av at verða mintur á.

Er tað tørvur á ráðstevnum sum hesari?

– Ja, tað er tað heilt sikkurt. Bæði fyri pedagogarnar og eisini fyri starvsfólkið. Hetta fær okkum at hugsa um, hvat tað egentliga er, sum vit ganga og gera í dagligdegnum.

Hildur Mikkelsen, starvsfólk, Dagstovnurin á Ternuryggi, Billa Simonsen, pedagog, Dagstovnurin á Ternuryggi, Birgit Dam Thomasen, pedagog, Barnagarðurin Vipan
Mynd: Eydna Skaale

Hvat hava tit fingið burturúr ráðstevnuni?

– Vit hava heilt sikkurt fingið nógv burturúr. Hetta hevur verið ógvuliga viðkomandi, við evnum, sum allatíðina eru aktuell. Vit blivu mint á, at vit hava ein stóran part av ábyrgdini fyri, hvussu børnini fara at verða, tá tey verða stór. Og tað er ógvuliga viktigt, at verða mintur á allatíðina. Vit hava eisini lært at skilja foreldrini eitt sindur betur. Tað er kanska eitt sindur spell, at foreldrini ikki eisini hava hoyrt hetta...

Er tað tørvur á ráðstevnum sum hesari?

Ja, tað er so heilt avgjørt! Vit hava allatíðina brúk fyri at síggja, hvat tað er sum vit gera, og hví vit gera tað. Tað er gott at seta fokus á hvat er rætt og hvat er skeivt. Og øll hava fingið nakað burturúr, bæði pedagogar og starvsfólk, tey úr Havn og tey av bygd.